# Myndlistin 2008




**Hóast listaframsýningarnar ikki gjørdust betri av, at tær í 2008 vóru fleiri í tali enn nakrantíð, sita nakrar lívsjáttandi listaupplivingar eftir í minninum hjá tygara ummælara, nú hon lítur aftur um bak**



Jan Anderson og Claus Carstensen í Grafiska Verkstaði Føroya

## Árið, sum fór



Kinna Poulsen

### AFL

Ársins fyrsta felagsframsýning, sum Felagið Føroysk Myndlistafólk fyriskipar í Listasavninum á hvørjum vári, gav ummælaranum hug at tríva í eitt hugtak hjá danska bókmentaummælaranum Lars Bukdal: "Generaliseret Kitsch", sum varð leysliga týtt til "Algild Forlorin List". Hetta listaslagið er serstakt við tað, at tað er lætt at ummæla jaligt, meðan tað er ringt at finnast at, av tí at verkini líkjast rættiligari list, meira enn rættilig list líkist rættiligari list. Tí meðan tann rættiliga listin ofta rakar skeivt, heldur Algild Forlorin List altíð til á breiða, trygga og rætta vegnum, og hetta var í stóran mun galdandi fyri mong av verkunum á ársins Várframsýning. Glottar hómaðust í myndunum hjá Jóhan Martini Christiansen og Anniku Hansen, og hvør kann til dømis gloyma barokku fotomyndirnar hjá Onnu Katrinu Højgaard av saftigum, vakurt smírandi seyðarhøvdum og teir báðar spákandi lakk- og leðursjeikarnar (tann eini við berum rumpustelli), sum Unn Joensen hevði sett inn í vøkru náttúruna uppi yvir Klaksvíkini.

Tað var forrestin sama listakvinna, ið nú gongur á listaskúla í Íslandi, sum við áskriftini: "WORKING IN A FISH FACTORY IS MORE IMPORTANT THAN ART" á einum lørifti royndi at sannføra seg sjálva um okkurt umráðandi, samstundis sum hon altso syrgdi fyri, at ummælarin ikki í øðini vendi út aftur av ársins fesjutu Ólavsøkuframsýning, men í staðin dvaldist nóg leingi til eisini har at uppliva smáar, men umráðandi glottar í eitt nú gátuføru myndum Halldis Olsens av eini avskeplaðari kúgv, ið huglagsliga góvu hugasamband við Blake og Goya, eins og fleirtýddu broderaðu myndirnar millum annað hjá Marionnu Bjørgheim vaktu stóran áhuga.

Silja Strøm sýndi á framsýning í Smiðjuni í Lítluvík myndir, ið geva góðar vónir til hesa ungu listakvinnuna, ið nemur sær útbúgving á The Glasgow School of Art. Seinni í ár fekk Silja ta heiðurligu og lønandi uppgávuna at gera ársins prent fyri ALS á Grafiska Verkstaði Føroya. Hetta er 10. árið á rað, at ALS á henda fyrimyndarliga hátt roynir at stuðla ungum, óetableraðum listafólkum.

### Halt áfram, Marius!

Marius Olsen hevði tíðliga í heyst framsýning í Galerie Stephanssons Hús, ið fekk ein púra býttan ummælara at bøna grafikaran um at halda áfram eftir sama góða leisti.

Hetta hevur eisini verið eitt gott listaár hjá Hanna Bjartalíð, sum í Galerie Focus í summar hevði eina fína framsýning við endurnýggjaðum myndamáli. Á framsýningini vóru millum annað tvær tvímyndir, ið avmyndaðu modelhús, sum Hanni ger sjálvur, og sum vit høvdu høvi at uppliva á Heystframsýningini. Arkitekturur hevur verið at sæð áður í summum av myndum hansara, men mest sum innirúm, ið hava verið karmur kring menniskju og teirra lív og ikki sum í hesum føri, har bygningar hava høvuðsleiklutin. Myndevnið hús, bygdarløg og býarpartar hava mong føroysk listafólk málað, til dømis Hans Hansen og Steffan Danielsen, og teirra myndir minna í báðum førum eitt sindur um hesar nýggjaru myndirnar hjá Hanna Bjartalíð, sum eru dekorativar, men væl meira hugsaðar enn vit hava verið von við áður, samstundis sum tær hava eitt kenslunemandi árin av góðvarni og einsemi.

Hetta sama kann sigast um myndirnar hjá Øssuri Johannesen, tó at tær á framsýning í Listaglugganum, ið taldist millum ársins áhugaverdu listupplivingar, sýntust nakað væl myrkari, eins og tær eru meira konkret ekspressivt málaðar, enn myndir Hanna.

### Ein skortfleingja

Í ár fekk føroyska myndlistin eitt tað mest atfinningarsama ummæli í mong ár. Hetta hendi í sambandi við framsýningina "Natúrligvís", ið var heitið á summarframsýningini í Norðurlandahúsinum, sum síðan 2007 hevur ferðast kring norðurlond, og sum á Sophienholm setti øði í listaummælaranum á Information, Michael Jeppesen, ið speiskliga gletti á tonn í einum ummæli, sum sjálvandi hevði gálvandi yvirskriftina "Naturligfis". Við Zachariasi Heinesen sum umráðandi undantaki verða serliga verkini hjá føroysku listafólkunum útspilt sum dilletantisk og pínlig av ummælaranum, ið endar við at siga, at tað er ein orsøk til, at føroysk list ikki er kend aðra staðni enn í Føroyum.

Í staðin fyri bert at kveistra tílíkar atfinningar frá okkum, skulu vit kanska hyggja nærri at, hvat tað er, ummælarin sigur. Tað er hóast alt so sjáldan, at føroysk list verður tikin so mikið í álvara, at hon fær eitt ummæli, ið veruliga fyriheldur seg til samtíðarlistina, og sum ikki endar í útvatnaðum, sentimentalum hugleiðingum um okkara praktfullu náttúru og William Heinesen. Tað, sum Jeppesen er serliga vónbrotin av, er, at hugskotið við framsýningini ikki er nóg gjøgnumført, og hesin trupulleiki hevur sum so við kurateringina at gera.

Orsøkin til, at hann skýrir alla føroyska list at vera vánaliga, er fyrst og fremst, at hann ikki hevur nóg góðan kunnleika til føroyska list, og at hann eyðsýniliga ikki dugir at skilja í millum simili og diamantar. Men vit eiga ein stóran part av skuldini sjálvi av hesum keðiliga lyndi okkara at blanda góða og vánaliga list saman, eins og vit í stóran mun brúka vánaliga list sum útflutningsvøru. Eitt



Claus Carstensen tók støði í litavali hjá føroyskum listafólkum. Her er tað Hansina Iversen